# *Samandráttur av almenna bygdaráðsfundi 25.02.2019*

**Bygdaráðsfundur  25.02.2019  kl.  18.00  til kl. 18.30**

| | | |
|---|---|---|
| **Fundarstað:** | **Fundarhøli** | |
| **Hjástødd**: | Jóhannus Danielsen | x |
| | Súni í Hjøllum | x |
| | Elin á Torkilsheyggi | x |
| | Niclas Davidsen | x |
| | Petur Jákup Petersen | x |
| | Kaj Eli Hansen | x |
| | Høgni Hansen | x |
| | Selma Hansen, skrivari | x |

**Til viðgerðar:**

Til fundin var lýst við 11 málum. Málunum nr. 10/2019 til nr. 20/2019. Borgarstjórin skeyt upp, at mál nr. 16/2019 bleiv tikið av skrá og útsett, og at taka mál nr. 21/2019 við á skránna.

**Tað var einmælt samtykt.**

**Mál nr. 10/2019   Keyp av journalskipan – kommunuskrivstovan**
J.nr. 85.11.00-G12-1-19
**Málslýsing**
Umsitingin hjá Nes kommunu skal hava nýggja journalskipan, tí verandi journalskipan SBSYS, ikki verður dagførd meira fyri teir føroysku brúkararnar.

Umsitingin hevur verið í samband við fleiri føroyskar veitarar, og 2 teirra hava verið á skrivstovuni og lagt fram teirra skipanir og givið tilboð. Eisini hevur kommunan fingið tilboð uppá konvertering av gomlu journalskipanunum til nýgga journalskipan.

Fyrisitingin mælir til, at kommunan útvegar sær Nema Journal frá Nema, og at Nema eisini tekur sær av konverteringini.

**Tilmæli**
Á fundi 19.02.2019 mælir Fíggjarnevndin til at taka av tilboðnum frá Nema, og at peningurin verður tikin av stovninum  kommunuskrivstovan.

**Avgerð**
Tilmælið var einmælt samtykt.

# *Samandráttur av almenna bygdaráðsfundi 25.02.2019*

**Mál nr. 11/2019 Umsókn um stuðul – Tofta Talvfelag**

J.nr.18.20.00-G01-1-19

**Málslýsing**

Í skrivi 04.02.2019 søkir Tofta Talvfelag um fíggjarligan stuðul fyri 2019. Tofta Talvfelag takkar fyri stuðulin undanfarin ár.

**Tilmælir**

Á fundi 13.02.2019 mælir Mentanarnevndin til at játta Tofta Talvfelag kr. 12.000 í stuðli fyri 2019.

Á fundi 19.02.2019 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við tilmælinum hjá Mentanarnevndini, og at peningurin verður tikin av stovninum Stuðul til ítrótt.

**Avgerð**

Tilmælini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 12/2019 _ Roknskapur 2018 – Bókasavnið í Nes kommunu**

J.nr. 21.00.00-009-1-19

**Málslýsing**

Roknskapurin hjá Bókasavninum í Nes kommunu fyri 2018 er blivin grannskoðaður av SPEKT og er sendur kommununi til góðkenningar.

**Tilmælir**

Á fundi 13.02.2019 mælir Mentanarnevndin til at taka undir við roknskapinum hjá Bókasavninum soleiðis, sum hann er uppsettur.

Á fundi 23.02.2019 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við tilmælinum hjá Mentanarnevndini.

**Avgerð**

Tilmælini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 13/2019 Umsókn um stuðul – Undirhúsið**

J.nr. 00.32.10-S08-1-19

**Málslýsing**

Í skrivi 01.02.2019 søkir Bátafelagið um fíggjarligan stuðul til Undirhúsið á Toftum fyri 2019.

Nevndin fyri Bátafelagið, heitir á bygdaráðið, um at veita felagnum kr. 45.000 í árligum stuðli til virksemið hjá Undirhúsinum.

Undirhúsið takkar fyri allan stuðul teir fingu í 2018, bæði fíggjarliga og á annan hátt.

**Tilmælir**
Á fundi 13.02.2019 mælir Mentanarnevndin til, at stuðulin í 2019 til Bátafelagið verður kr. 45.000.
Høgni Hansen var úti, tá málið var viðgjørt.

Á fundi 23.02.2019 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum hjá Mentanarnevndini.
Høgni Hansen var úti, tá málið var viðgjørt.

**Avgerð**
Tilmælini vóru einmælt samtykt.
Høgni Hansen var úti, tá málið var viðgjørt.

**Mál nr. 14/2019. Grundstykkir: Afturkeyp av grundstykkjum**

J.nr. 02.01.00-601-1-19

**Málslýsing**
Nes kommuna hevur í nógv ár ikki keypt grundstykkir aftur, sum kommunan hevur selt til borgarar at byggja sethús á.

Tað kemur fyri, at borgarar ynskja at selja grundstykkini aftur til kommununa. Eisini hevur kommunan onkuntíð tørv á, at hava møguleikan til, at keypa grundstykkir aftur, tí tað ikki blívur bygt á tey.

Støða skal takast til, um kommunan kann keypa seld stykkir aftur, og um skriv skulu sendast til borgarar, sum hava átt grundstykki í meiri enn 2 ár og ikki bygt.

**Tilmælir**
Á fundi 12.02.2019 mælir Tekniska nevnd til, at kommunan kann keypa grundstykkir aftur.

Eisini mælir Tekniska til at senda skriv til tey sum eiga grundstykki, har tíðarfreistin um bygging er farin, við áheitan um at byggja innan 1. nov. 2019.

Á fundi 23.02.2019 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við tilmælinum hjá Teknisku nevnd.

**Avgerð**
Tilmælini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 15/2019. Umsókn um loyvi til uppíbygging**

J.nr. 02.34.02-P20-44-16

**Málslýsing**
Tann 29. januar 2019 søkir Jens Kristian Hansen, vegna Nizu og Hans Hilmar Johannessen Toftir, um loyvi at byggja uppí sethúsini á matr.nr. 522 Toftir.

Grannasáttmáli fyriliggur.

**Tilmæli**
Á fundi 12.02.2019 mælir Tekniska nevnd til at geva byggiloyvið.

**Avgerð**
Tilmælið var einmælt samtykt.

**Mál nr. 16/2019. Áheitan um ferðsluforðing**
J.nr. 02.34.02-P20-41-16

**Tikið av skrá.**

**Mál nr. 17/2019. Earth Hour 2019**
J. nr. 09.01.00-G01-1-19
**Málslýsing**
Leygardagin tann 30. mars, kl. 20.30, verður afturvendandi tiltakið, har sløkt verður fyri ljósinum ymsar staðir í heiminum í 1 tíma. Nes kommuna luttók fyri fyrstu ferð í 2018, tá gøtuljósini blivu slókt í ein tíma.

Áheitan er komin, frá WWF Verdensnaturfonden, um aftur at luttaka í tiltakinum 2019.

**Tilmæli**
Á fundi 12.02.2019 mælir Tekniska nevnd til at sløkkja øll gøtuljós sambært áheitanini, tó ikki á havnalagnum.

**Avgerð**
Tilmælið var einmælt samtykt.

**Mál nr. 18/2019. Umsókn frá J&K Petersen um at goyma grót í Tofta Havn**
J. nr. 08.03.26-P20-1-16
**Málslýsing**
Í samband við arbeiðið hjá J&K Petersen um at leingja verjugarðin, sum í løtuni er í gongd, søkir felagið um at sleppa at leggja grót á goymslu sunnast í havnini, frá Kassamiðstøðini og vestureftir.

Óvist er hvussu stór nøgdin er, og hvussu leingi grótið kemur at liggja, men tað skal bert liggja har so leingi arbeiðið varðar, sum sambært sáttmála skal verða liðugt á heysti 2019.

J&K Petersen tekur alt grótið uppaftur og ruddar økið.

**Tilmæli**
Á fundi 12.02.2019 mælir Tekniska nevnd til, at J&K Petersen fær loyvi til at leggja grót á nevnda økið.

**Avgerð**
Tilmæli frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 19/2019 Gøtan Undir Nesinum/Saltnes - ljós og viðlíkahald**
J.nr. 05.04.00-P20-1-16
**Málslýsing**
Í skrivi dagf. 3. januar 2019 kemur áheitan frá nevndini fyri spæliplássið í Saltnesi um at fáa ljós til gøtuna frá Saltnesi og niðan Undir Nesi. Somuleiðis bjóða tey seg at hampa um gøtuna.

**Tilmæli**
Á fundi 15.01.2019 mælir Tekniska nevnd til, at viðlíkahald verður gjørt sambært skrivinum, og ljós uppsett. Tilboð uppá gøtuljós frá fleiri veitarum skulu fyriliggja.

Tilboð eru síðani komin frá íalt 3 veitarum.

Á fundi 19.02.2019 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum hjá Teknisku nevnd, og mælir til, at taka av lægsta tilboðnum uppá gøtuljós, frá SP/F Elektrikarin, uppá kr. 72.000, uttan MVG.

**Avgerð**
Tilmælini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 20/2019 Umsókn um fíggjarligan stuðul - lukkað**
J.nr. 81.45.00-G01-1-18

**Mál nr. 21/2019. Umsókn frá KBH um at fáa asfalt á økið runt um nýggju tjaldhøllina**
J. nr. 08.03.25-P20-6-18
**Málslýsing**
Byggivirkið KBH søkir í teldupost tann 15. januar 2019 um at fáa økið runt um nýggju tjaldhøllina, á matr. Nr. 414d, asfalterað. Økið er 1075m² til støddar.

Tilboð uppá asfaltering fyriliggur. Kostnaðarmeting fyri klárgerð og asfaltering er kr. 430.000.

**Tilmælir**
Á fundi 12.02.2019 mælir Tekniska nevnd til at asfaltera økið runt høllina.

Á fundi 19.02.2019 mælir Fíggjarnevndin til at taka av tilmælinum hjá Teknisku nevnd, og mælir til, at peningurin verður tikin av §6, Reinsiverkið íløga.

**Avgerð**
Tilmælini vóru einmælt samtykt.